# Alt er gott í Hvalvík

**Daniel Udsen, sum spælir við EB/Streymi og býr í Hvalvík, hevur bara gott at bera bygdini, felagnum og arbeiðsplássinum í frítíðarskúlanum. Les samrøðuna við danan, sum her greiðir frá, hvørjir av hansara liðfeløgum høvdu staðið seg í bestu donsku fótbóltsdeildini, hvat børnini í frítíðarskúlanum læra hann og hví hann gleðir seg til Sundalagsstevnuna**



*Daniel Udsen dámar sera væl at arbeiða í frítíðarskúlanum í Hvalvík, og ofta er hann á vøllinum við Margáir saman við børnunum og spælir bólt*

Mynd: Annika Waag Dam

Rólant Waag Dam

Miðskeiðis í januarmánaði í ár flutti ein dani til Hvalvíkar. Nakrar dagar áðrenn hevði EB/Streymur kunngjørt, at felagið hevði gjørt sáttmála við 26 ára gamla Daniel Udsen, sum kom úr danska felagnum Vanløse.

Í Vanløse varð Daniel Udsen nógv róstur fyri síni avrik á miðvøllinum, og tað var millum annað tað, sum gjørdi, at EB/Streymur gjørdi avtalu við hann.

– Tað var gjøgnum mínar kontaktir frá tíðini í FC Amager, at eg kom í samband við føroyskan fótbólt. Todi Jónsson og Julian Hansen vóru báðir, tá eg spældi har. So tosaði eg eisini við Dennis Holmberg, sum spældi við B36 í fjør, um støðið og hvørt av sínum, greiðir Daniel Udsen frá, um sambandið við EB/Streym og føroyskan fótbólt.

Síðani kom hann til Føroya og undirskrivaði sáttmálan við EB/Streym.

– Og tað havi eg á ongan hátt angrað, sigur Daniel Udsen avgjørdur.

## Danskur innandurameistari

Daniel Udsen er annars uppvaksin í Albertslund uttanfyri Keypmannahavn, har hann spældi so at siga øll síni ungdómsár. Síðani skifti hann til Hvidovre, men var skaddur í næstan tvey ár og flutti tískil aftur til barndómsfelagið, har hann spældi í trý ár. Síðani hevur Daniel Udsen verið í bæði Greve, FC Amager, FC Vestsjælland og Vanløse, áðrenn leiðin gekk til EB/Streym og føroyskan fótbólt.

Sum tað sæst, so er hetta ikki lið, sum hava verið við at mynda toppin í donskum fótbólti.

– Men eg havi verið Danmarksmeistari í innandurafótbólti fleiri ferðir, sigur Daniel Udsen flennandi. Við hesum tryggjaði hann sær eisini rætt at spæla Champions League í innandura fótbólti, men hetta valdi Daniel Udsen tó frá.

– Tað verður spælt í augustmánaði, og eg havi altíð raðfest uttandura fótbólt framum innandura, sigur hann. Tískil vóru liðfelagar hansara á innandura liðnum í Montenegro í fjør og spældu uttan hann.

Í ár er tó líkt til, at Daniel Udsen sleppur at spæla altjóða fótbólt uttandura. EB/Streymur skal nevniliga spæla Euro League í summar, og tað gleðir Daniel Udsen seg nógv til.

– Tað var millum annað upplivingar sum tað, eg vónaði at fáa í føroyskum fótbólti, sigur hann.

Eitt annað, sum Daniel Udsen eisini vónar og droymir um, er at gerast partur av føroyska landsliðnum.

– Omma mín Anna Jacobsen var úr Sørvági, so eg eri ein fjórðings

## Eingin broyting – og tó

**Annars heldur Daniel Udsen ikki, at tað var tann stóra broytingin at koma til Føroya.**

**– Eg havi verið her onkuntíð fyrr, so tað var eingin skelkur sum so. Og í mangar mátar minnir tað nógv um Danmark. Her síggja vit eisini danskt sjónvarp og keypa danskar vørur. Tað einasta sum manglar, er í roynd og veru familjan, daman og vinmenninir. Men eg havi so fingið nakrar vinmenn her, so tað hjálpir væl, sigur Daniel Udsen, sum nú gleðir seg til Sundalagsstevnuna.**

**– Ja, fólkið í bygdini tosa nógv um tað. Sum eg skilji, so verður tað onkur kapping við bátum, fortelur Daniel Udsen, sum eftir øllum at døma ikki heilt hevur sett seg inn í tjóðarítrótt okkara enn.**

**– Eg haldi í øllum førum, at fólk gleða seg nógv. Vit spæla so móti ÍF um kvøldið, og so sleppa vit kanska ein túr í bygdina aftaná. Tað er í øllum førum heilt øðrvísi í mun til í Danmark. Veitslurnar her eru nógv meira sosialar, og øll eru við. Tað er stuttligt, haldi eg, sigur Daniel Udsen.**

**Nú vónar hann Daniel Udsen, at tað eisini av álvara verður stuttligt at spæla landskappingarfótbólt við EB/Streymi.**

**– Tað gekk einki serligt at byrja við. Men eg haldi, at vit hava spælt betri enn tað, stigatalvan vísir. Seinastu fýra landskappingardystirnar hava vit eisini fingið tíggju stig, og vónandi fáa vit trý aftrat leygardagin, sigur Daniel Udsen.**